## Símun í steypadysti

Í kvøld spælir Keflavík dyst ímóti Víkingi á Laugerdalsvøllinum í Reykavík. Dysturin er í steypakappingini, sum íslendingar nevna VISA-bikarkeppninn. Keflavík og Víkingur hava spælt tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum í ár. Aðru ferð endaði við javnleiki, og hina ferðina vann Keflavík 2-1. Símun Samuelsen spælir fyri Keflavík, og hann og liðfelagararnir ætla at reisa seg eftir tapið ímóti botnliðnum ÍA seinasta vikuskiftið. Dysturin verður spældur í kvøld kl. 21.00.



## OB-spælarar seinkaðir av toki

Í Danmark verður nógv funnist at DSB, tí felagið klárar ikki halda tíðirnar í tokferðsluni. Nú um dagarnar kundu fjølmiðlarnir so siga søguna um fýra spælarar hjá OB, sum komu ov seint til venjingar, tí tókið hjá teimum var so nógv seinkað. Ætlanin var, at teir fýra spælararnir, sum búgva í Keypmannahavn, skuldu venja klokkan 10.00, men teir vóru nógv seinkaðir til venjingina. Aftur fyri sluppu spælararnir hjá OB at venja eitt sindur longri leygardagin, og í gjár eydnaðist liðnum at vinna í superliguni.

# Tað skinklaði nógv á Svangaskarði

KÍ
B68



*Julian Johnsson liggur og lúrir í brotsteiginum, og løtu seinni stútar hann bóltin í málið til 3-2*

*Mynd: Kjartan Madsen*

**Klaksvíkingar høvdu undan steðginum stóra úrtøku, meðan B68 – eftir at tað hevði sæð vónleyst út – í 2. hálvleiki var um reppið at vinna eitt stig**

**B68-KÍ**

*Rólant Waag Dam*

KÍ fór fyri aðru ferð í ár av Svangaskarði við øllum stigunum. Í fyrra førinum vunnu teir sannførandi 4-0 sigur. Eftir 1. hálvleik sunnudagin bendi alt á, at tað eisini hesa ferð fór at verða talan um tryggan sigur.

Soleiðis tørnaði tað ikki út í 2. hálvleiki. Marek Wierzbicki sá aðru ferð gult og harvið reytt, tá ið dómarin tíggju minuttir eftir steðgin metti, at veteranurin hevði tikið beinið undan Jóhan Petur Poulsen. Súni Fríði Barbá var tryggur úr ellivu metrum. So stríddust teir reyðu fyri at koma afturíaftur.

Tað eydnaðist ikki, men tað var tætt við. Eitt korter undan leikloki minkaði Julian Johnsson um munin til 2-3, tá ið hann við høvdinum stýrdi hornasparksinnleggi úr vinstru í málið. B68 spenti álopsbogan, og onkra ferðina var tað heilt spennandi frammanfyri væl upplagda Meinhardt Joensen.

Síðstu løtuna royndi KÍ at draga ferðina niður. B68 royndi at koyra á, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál. Hjá KÍ var Jan Andreassen sera eyðsýndur, eftir at hann sjey minuttir undan leikloki hevði avloyst skadda og raska Høgna Madsen.

### Góða KÍ løtan

KÍ legði fyri í undrandi álops kendari útgangsstøðu. Framrættaði Kristoffur Jacobsen loysti leikbannaða Harley Bertholdsen av í høgru í trímanna verjuni. At KÍ verjan var so framrættað, bar við sær, at holini vóru stór.

Besta B68 møguleikan í 1. hálvleiki fekk Ovi Magnussen, tá ið hann royndi úr ellivu metrum, eftir at dómarin hevði bríkslað, tí hann metti, at Marek hevði togað Súna Fríða Barbá niður. Meinhardt Joensen hálvbjargaði, og Kristian Anton Andreasen sendi returbóltin upp um tóma málið.

Hin hundrað prosent B68 møguleikan fekk Alexandro Castilho, sum annars var eyðsýndur á ytsta miðvallar plássinum í vinstru. Eftir uppspæl í høgru var hann blankur fyri málinum. KÍ málverjin hevði tveitt seg, og málið var púra opið, tá ið brasiliumaðurin úr stuttari fjarstøðu og mitt fyri legði bóltin skeivu megin stólpan!

KÍ hevði størri tyngd og hugflog í 1. hálvleiki, og KÍ spældi seg til fleiri møguleikar. Fyrsta málið skoraði Christian Lundberg í 9. minutti. Hjalgrím Elttør, sum í útgangsstøðuni var ytsti miðvallarin í vinstru, meðan Heðin á Lakjuni var í høgru, sneiddi framvið fleiri, áðrenn hann frá baklinjuni legði útfrá til Christian Lundberg, sum úr stuttari fjarstøðu sendi í meskarnar.

Smáar tíggju minuttir seinni var uppspælið fínt til 2-0 málið, sum Paul Clapson skoraði. Aftarlaga úr vinstru sendi Símun Joensen diagonalt til Heðin á Lakjuni, sum úr høgru legði innfyri til Clapson, sum er KÍ toppskjútti.

Og KÍ sigurin tóktist vera fullvísur, tá ið klaksvíkingar í síðsta minuttinum undan steðginum øktu til 3-0. Aftur hesa ferð var málið útlendskt. B68 liðið var ógvuliga frammarlaga, tá ið KÍ framspæling mitt eftir endaði hjá Paul Clapson, eftir at Christian Lundberg við kropsfintu hevði togað heimaverjuna sundur. Clapson rann frá verjuni og legði bóltin framvið Tórða Thomsen.

Fyrstu minuttirnar eftir steðgin bendi einki á annað enn trivaligan KÍ sigur. Men so varð Marek útvístur, B68 minkaði um munin, og í staðin fyri heimaliðið var tað nú KÍ, sum av álvara skinklaði. Men tað gekk akkurát hjá klaksvíkingum, sum framvegis droyma um rættin at taka lut í Europa Cup, meðan toftamenn eisini eftir 21. umfarið kenna tað brenna undir sær.

## Meinhardt tók enn eitt straffi

Meinhardt Joensen er ein rættiligur serfrøðingur í at bjarga brotsspørkum. Sunnudagin fekk B68 brotsspark í fyrra hálvleiki, men tá ið Ove Magnussen varð settur at skjóta, bjargaði Meinhardt skotinum.

- Hetta var fjórða straffi, sum eg bjargaði í ár. Eg skuldi eisini havt bjargað tí seinna straffinum, sum teir fingu, sigur Meinhardt.

Hann viðurkendi eftir dystin, at KÍ kom undir trýst í seinna hálvleiki.

- Tað var effektin av, at vit mistu ein spælara, og teir skoraðu eitt mál. Eftir hetta lótu vit okkum trýsta aftur á vøllin, og hóast teir ikki høvdu so nógvar kjansir í seinna hálvleiki, so máttu vit verja mesta av tíðini, sigur hann.

## Brendu ov nógv

Súni Fríði Barbá var við í tí mesta hjá B68 í gjár. Hann legði upp, royndi móti málinum og skoraði annað B68-málið.

– Vit áttu at fingið meira burtur úr hesum dystinum. Vit høvdu minst líka stórar kjansir sum KÍ í fyrra hálvleiki, men meðan teir skoraðu trý mál, fingu vit einki mál, sigur hann.

– Teir fingu eina útvísing tíðliga í seinna hálvleiki, og tá duttu teir aftur á vøllin. Men tá høvdu vit eitt sindur trupult við at skapa teir stórur kjansirnar. Nú hava vit seks finalur eftir at spæla, sigur Súni Fríði Barbá.